

*Gunnar Dahl-Olsen vann FM í 30 kilometra einkultstarti leygardagin*

*Savnsmynd*

# Gunnar vann einkultstartin

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Leygardagin varð skipað fyri FM í 30 kilometra einkultstarti. Ikki serliga óvæntað vann Gunnar Dahl-Olsen sannførandi.

Hann var góðar sjey minuttir frammanfyri sín nærmasta kappingarneyta, sum var Eli Christiansen. Eli vann sera tepurt frammanfyri Beinir W. Rasmussen, ið var á triðja plássi.

Súkklað varð annars frá Plantusøluni í Havn til Kaldbaks og aftur.

**Endaliga støðan:**

1. Gunnar Dahl-Olsen 41 min. 52 sek.
2. Eli Christiansen 48 min. 57 sek.
3. Beinir Waagstein Rasmussen 49 min. 10 sek.
4. Kári Simonsen 51 min. 45 sek.
5. Esmar Joensen 51 min. 46 sek.
6. Christian Guttesen 52 min. 32 sek.
7. Evald Rasmussen 54 min. 58 sek.
8. Dia Jacobsen 55 min. 57 sek.
9. Gudmundur Joensen 57 min. 24 sek.
10. Eyvind Akraberg Hansen 57 min. 27 sek.
11. Gutti Harryson 62 min. 24 sek.

**Unglingar:**

1. Bergur Krosstein 52 min. 50 sek.
2. Dánjal Michaelsen 55 min. 4 sek.
3. Bergur Ingemarsson Johansen 56 min. 24 sek.

# Nú sleppur KÍ at royna seg



*Rannvá Andreasen og hinar í KÍ skulu nú aftur royna seg í evropeiskum fótbólti*

*Savnsmynd*

**KÍ kvinnurnar skulu í hesi vikuni luttaka í Europa Cup kapping, sum verður spæld í Hollandi**

KÍ KVINNUR Í EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Í heimligu kappingini fáa tær so at siga onga mótstøðu. Men tað fara tær at fáa í hesi vikuni. Fleirfaldu meistararnir og steypavinnararnir úr KÍ skulu í hesi vikuni luttaka í UEFA Women's Cup í Hollandi. Tær fóru av landinum í gjár, og tær koma aftur til Klaksvíkar mánadagin í næstu viku.

Á ferðini í Hollandi skal KÍ spæla tríggjar dystir. Tann fyrsti verður longu í dag ímóti eingilska meistaraliðnum Fulham. Hósdagin verður spælt ímóti hollendska meistaraliðnum Leede, og leygardagin er FC Codru, sum er meistaraliðið í Moldova, á skránni.

Kappingin gongur fyri seg í Sassenheim, sum liggur einar tredivu kilometrar uttanfyri Amsterdam. Tað er hollendska meistaraliðið Sassenheim, sum stendur fyri kappingini.

Venjarar hjá KÍ eru Jón Harald Poulsen og Ovi Nysted. Hesin seinni nevndi er fastur maður í miðverjuni á KÍ liðnum, men gula kortið, sum hann fekk ímóti EB/Streymi, hevur við sær, at hann er leikbannaður, tá ið KÍ sunnudagin skal spæla á Toftum. Tí er hann við í Hollandi.

## Drúgvar royndir

Tað er besta kvinnuliðið nakrantíð í Føroyum, sum í gjár fór av landinum. Flestu KÍ spælararnir hava verið við í nógv ár, og tær vita, hvat tað snýr seg um, og hvørji krøvini eryu, tá ið tað snýr seg um Europa Cup fótbólt.

Hetta er triðja árið á rað, at KÍ er við í UEFA kappingini. Í fjør vóru tær í Umeå í Svøríki. Har taptu tær í fyrsta dystinum 7-0 ímóti heimaliðnum, sum fyrr í ár endaði sum vinnari av kappingini. KÍ tapti 4-0 ímóti Sparta Prag, og so vunnu tær 2-0 ímóti Visa Tallinn úr Estlandi.

Málið hesa ferð er at standa seg eins væl sum seinast og kanska eitt sindur betur. Tað verður torført bæði ímóti Fullham og Leede. Kvinnufótbólturin í Onglandi og í Hollandi telist millum teir betru í Europa. Stóri møguleikin hjá KÍ verður ivaleyst ímóti moldoviska meistaraliðnum.

KÍ hevur bara vunnið stórt í landskappingini, so tí ber illa til at siga, at tær eru í góðari dystarvenjing. Seinastu tvær ferðirnar hava tær vunnið 18-0 á AB og 10-0 á EB/Streymi. Einasta ferðin, at KÍ liðið hevur fingið mótstøðu í heimligu kappingini í ár, var í steypafinaluni á Ólavsøku, tá ið tær vóru væl nøgdar við, at tær noyddust at stríðast fyri at vinna 2-1 á HB.

Umframt at venja nógv fyri at vera so væl fyri, sum tað ber til, so hava KÍ kvinnurnar undan ferðini til Hollands skipað fyri fleiri tiltøkum fyri at fáa fígging til ferðina.

## Íslendski hópurin

| | Navn | Føddur | Tiðarbil | Dystir | Mál | Félag |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Birkir Kristinsson | 150864 | 1988-2002 | 73 | | ÍBV |
| 2 | Árni Gautur Arason | 070575 | 1998-2003 | 29 | | Rosenborg BK |
| 3 | Rúnar Kristinsson | 050969 | 1987-2003 | 100 | 3 | Sporting Lokeren St. |
| 4 | Arnar Grétarsson | 200272 | 1991-2003 | 61 | 2 | Sporting Lokeren St. |
| 5 | Hermann Hreiðarsson | 110774 | 1996-2003 | 49 | 3 | Charlton Athletic FC |
| 6 | Helgi Sigurðsson | 170974 | 1993-2003 | 47 | 10 | SFK Lyn |
| 7 | Þórður Guðjónsson | 141073 | 1993-2003 | 46 | 12 | VfL Bochum |
| 8 | Lárus Orri Sigurðsson | 040673 | 1995-2003 | 41 | 2 | West Bromwich Albion FC |
| 9 | Brynjar Björn Gunnarsson | 161075 | 1997-2003 | 37 | 3 | Nottingham Forrest FC |
| 10 | Arnar Þór Viðarsson | 150378 | 1998-2003 | 26 | | Sporting Lokeren St |
| 11 | Eiður Smári Guðjohnsen | 150978 | 1996-2003 | 24 | 8 | Chelsea FC |
| 12 | Heiðar Helguson | 220877 | 1999-2002 | 23 | 2 | Watford FC |
| 13 | Jóhannes Karl Guðjónsson | 250580 | 2001-2003 | 13 | 1 | Real Betis Balompie |
| 14 | Marel Baldvinsson | 181280 | 2001-2002 | 11 | | Sporting Lokeren St. |
| 15 | Ívar Ingimarsson | 200877 | 1998-2003 | 11 | | Wolverhampton Wanderers |
| 16 | Ólafur Örn Bjarnason | 150575 | 1998-2002 | 11 | | Grindavík |
| 17 | Indriði Sigurðsson | 121081 | 2000-2003 | 10 | | Lilleström SK |
| 18 | Veigar Páll Gunnarsson | 210380 | 2001-2003 | 3 | | KR |



*Gudni Bergsson og John Petersen í hornatøkum í fyrra dystinum millum Ísland og Føroyar, sum íslendingar vunnu 2-1*




# Koyrikortsskeið

til lastbil,
trailara og buss
byrjar mikudagin
20. august kl. 19.30

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Stanley Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

Jekaragøta 10 • Tórshavn

SISERO 351800



# Farloysarastarv

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi frá 1. september 2003 til 28. februar 2004, setanarbrøk 0,65, íroknað tilkallivakt heimanífrá.

Løn sambært Fíggjarmálaráðnum og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til leiðaran á tlf. 456775.

Umsókn við avrit av prógvi og góðkenning skal sendast til:

**Norðoya Ellis og Vistarheim**
Garðavegur 10
FO-700 Klaksvík
Att.: Leiðarin

Umsóknarfreist 26. august. 2003



# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Lexus IS200 6 syl. 2000 cc
**Árg.:** 2001
**Km:** 22.094
**Eyka útstýr:** Leðursetur, 6 gear, 17" alufelgur, klimaanlegg v.m.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast hjá T. F. á Hálsi í Havn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 34 56 56 · fax nr. 37 31 17
Mobil tlf. 22 48 59
at hitta millum kl. 8.00-10.00
Magnus E. Joensen, sýnsmaður



# Til sølu

**Lastbilar**
Volvo F10 6x2 v/kassa
Scania 142H 6x2 dumparalast
MAN 26.361 6x6 skiftilast/-krana

**Gravimaskinur**
Brøyt x30 og tilhoyrandi frontlessari
Pel-Job LS2000 3,6 tons

**Persónbilar**
Ford Escort, árg. '84
Mitsubishi Galant 1.8TD, árg. '90

**Leguvognar**
Schmitz niðurbygd cont.last
Schmitz hurðar vinstru síðu

**Tlf. 212104/332104**



# Lærlingur søkist

Søkt verður eftir lærlingi at byrja skjótast gjørligt

Arbeiði umfatar bæði skrivstovuarbeiði og koyring

Løn sambært avtalu

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. september

Hava tit spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, vinarliga ring til:
Eystara Bryggja

SAFARI TRANSPORT
100 Tórshavn
Tlf. 322222
Fax 313222



# Tubbaks AVVENJINGarskeið

Er tað trupult hjá tær at sleppa av við sigarettirnar??? Her hevur tú møguleikan.

Undirritaða heldur skeið fyri fólki, sum hava avgjørt at gevast at roykja, og sum vilja hava hjálp til hetta.

**Skeiðið inniheldur:**
- Undirvísing einaferð um vikuna í 5 vikur.
- Upplýsing um royking og nikotinbundinskap.
- Meting av roykimynstrinum hjá tí einstaka skeiðluttakaranum.
- Leiðbeining til tubbaksfría framtíð.
- Undirvísing í nýtslu av nikotinapoteksvørum, um tørvur er á hesum.

Skeiðið byrjar tann 26. august 2003
Kostnaðurin fyri skeiðið er 1.000 kr.

Melda teg til á tlf. 282 171

**Maria Olsen**
Vegleiðari

Sosialurin 341800



# Eldri hús í Tórshavn til sølu

Um hóskandi boð fæst verða húsini í Eiriksgøtu 17 seld.
Húsini eru í trimum hæddum, uml. 48 $m^2$ hvør, og eru tvær hæddir innrættaðar.
Stovuhædd: 2 kømur, stova, køkur og baðiverilsi.
Loftshædd: 2 kømur, stova, køkur og wc.
Kjallarin er ikki innrættaður.

Áhugað kunnu ringja tlf. 227647



# Seksæringur bíliga til sølu



Vælhildin og sera snøggur bátur við góðari dieselmaskinu o.ø.

**Tlf. 210878**



# Til sølu



Tveir 14 mánað gamlir Seadoo XP Vatnskutarar til sølu. Skutararnir ganga 65 Mph og eru sum nýggir.

Til sølu fyri 90.000 kr./stk.

**Ringið á tlf. 220278 ella 210417**



# Aðalfundur

Aðalfundur verður, mikudagin 20. august kl. 19.00, í:

MBF-Húsinum
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn

**Føroya Psoriasis Felag**


www.sosialurin.fo